gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Lætt hjá Finni at hóreiggja sær

Løgtingsmaðurin Dan Petersen hevur so sára rætt í viðmerking síni, at skrivingin hjá samgongulimum, eitt nú Finni Helmsdal, er desperat, nú valið nærkast, og einki er vunnið á fullveldisleið, samstundis sum aðrir samfelagstættir eru misrøktir. Í síni greining um vinnupolitikk Javnaðarfloksins í greinini um, at javnaðarpolitikkur elvir til ábyrgdarloysi, fær tjóðveldismaðurin tað at ljóða sum um, at Javnaðarflokkurin hevur stuðlað vinnulívi og vinnulívsmonnum einans við tí endamáli at fáa atkvøður og at hesin politikkur nærum var eitt sjálvtøkuborð.

Javnaðarflokkurin hevur altíð ásannað, at fyritreytin fyri vælferðarsamfelagnum við góðum almanna-, heilsu- og mentannarviðurskiftum er ein sterkur búskapur, og kjarnin í einum góðum búskapi er eitt sterkt, fjøltáttað og dynamiskt vinnulív við einum breiðum eigaraskara. Tí hevur flokkurin rikið ein virknan vinnupolitikk frá byrjan. Politikkurin hevur verið at seta upp lógarkarmar, m. a. skattapolitiskt, við almennum partapeningi, veðhaldum og stuðulslánum.

Uttan veðhald og stuðulslán var neyvan línubáta- og seinri sildaflotin bygdur upp síðst í 50-unum og fyrst í 60-unum. Politikkaranum við tí vantandi søguliga innlitinum kann upplýsast, at tey vinnuligu framtøkini frá 1959 til 1962 løgdu av álvara lunnar undir vælferðarsamfelagið. Uttan almennan partapening, kanska eisini veðhald, vóru neyvan tey nógvu flakavirkini bygd. Tað vóru tann nýggi flotin og virkini, sum gjørdu, at 3-4000 føroyingar kundu koma heimaftur at vinna ella fáa tjans við føroyskum skipum, tí hesir føroyingar noyddust í 50-unum at vinna sær úrtøku í Íslandi og Grønlandi ella við norskum, týskum og bretskum skipum!

Hetta var ikki nakað sjálvstøkuborð, men hesin politikkur gav ungum, evnaríkum monnum, samvinnufeløgum og útgerðarvirkjum møguleikan at ogna sær fiskifør, og summir av hesum monnum kundu halda fram innan aðrar veiðihættir, eitt nú við silda- og rækjuskipum til gagns fyri føroyska samfelagið.

Seinri, í 70-unum, kom stuðulsskipanin, við t. d. ráfiskagrunninum, sum var neyðug tá, men sum virkaði alt ov leingi, og ikki sum ætlað. Politikkaranum við vantandi søguvitanini skal upplýsast, at Tjóðveldisflokkurin sat eisini í Tinganesi hetta valskeið og hevði landsstýrismannin í Fiskivinnumálum. Hesin stuðul vaks ikki upp um fjallatindarnar, meðan Javnaðarflokkurin hevði stjórnarábyrgd. Tvørturímóti var Javnaðarflokkurin við til at fáa kappingarpartin inn í skipanina, og var seinri eisini við til seta skipanina úr gildi. Tað er lætt hjá einum høvuðsstaðarpolitikkara at hóreiggja sær ídag um skeivan vinnupolitikk, men teir politikkar, sum løgdu rygg til tá, gjørdu tað fyri at skapa vinnu og fólki virkismøguleikar, fáa samfelagnum inntøkur, og byggja út okkara góða land, vælferðarsamfelagið, so eisini Finnur Helmsdal fekk møguleikar at virka innan almannaverkið!

**Sosialurin**

## VIÐMERKING

Lógin um vinnuligan fiskiskap:

# Verður umsitin í stríð við andan í lógini

**Heini O. Heinesen**



Viðmerkingar til landsstýrismannin í fiskivinnumálum og fyrispurningar.

Fiskimálastýrið og Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, tosa nógv um at minka um veiðitrýstið. Hesir somu, sum tala um minking av veiðitrýstinum, ganga nú á odda at innflyta norskar línubátar inn í útróðrarflotan á sama hátt, sum byrjað varð við Froyanesi í sínari tíð.

Tað, sum eg vil hava at vita frá Jørgeni Niclasen, er, um hann ætlar at gera allan útróðrarflotan til línuskip. Skip, sum hava ligið og gnagað gummi í fleiri Harrans ár, kunnu nú umdoypast til norskar innfluttar frystilínubátar. Mær er sagt, at teir, sum keypa hesar bátar, fáa studning úr norska statskassanum, til at uppkeypa fiskiloyvir í Føroyum.

Spurningurin er bara: Er tað neyðugt í heila tikið at áseta fiskidagar, um hetta skilið heldur fram? Og eg kundi hugsað mær at spurt: Hvar er felagið Línuskip í hesum leiki, nú teir verða etnir upp innanífrá?

Tað eru heilt aðrar reglur galdandi um stødd og veiðitrýst, tá ið útrórarmenn skulu skifta sínar bátar út, men tá ið tað er at uppkeypa norskar frystilínubátar, er einki óført. Eg havi skilt, at bátar upp á fleiri hundrað tons eru á veg inn í flotan fyri útróðrarbátar, sum hava verið lítið og einki brúktir seinastu árini. Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita frá Jørgeni Niclasen og Fiskimálastýrinum, hvar heimildirnar í lógini liggja? Er tað rætt at leggja fleiri enn tvey loyvir saman?

Prosentbýtið í lógini er ikki burturtikið enn. Heini O. Heinesen og Tjóðveldisflokkurin fara ongantíð at ganga við til, at hetta prosentbýtið verður burturtikið. Tí er tað eisini ein spurningur fyri Meginfelag Útróðrarmanna, at teirra bólkur nú verður uppetin av hesum somu skipum, sum við studningi eru tikin úr norska flotanum fyri at regulera teirra veiðitrýst. Hesin studningur skal nú brúkast til at økja veiðitrýstið á føroyska landgrunninum.

Høvdu hesi skip komið inn í flotan fyri okkara gomlu línubátar, so var logikkur í hesum, men tað, sum nú hendir, er, at vit fáa fleiri línuskip, enn gott er. Sum er, hava vit ivaleyst av línuskipum á føroyagrunninum. Og teir, sum eru her frammanundan, koma so at fáa skerdar møguleikar.

Skulu vit í framtíðini hava ein havgangandi útróðrarflota, er neyðugt, at hesir leggja saman í sínum egna bólki. Tað kann ongantíð verða rætt, at fiskiloyvir verða flutt úr útróðrarflotanum til stór línuskip, sum kunnu royna í so gott sum í øllum veðri, 24 tímar um samdøgnið, meðan útróðrarbátar bert eru nakrar fáar tímar úti, tá ið viðrar.

Um hetta heldur fram, er eingin grund fyri í heila tikið at tosa um avmarkingar í veiðitrýstinum, tí tað er eingin partur í flotanum, sum er so nógv avmarkaður av veðri og vindi sum útróðrarflotin.

Spurningurin er eisini, hvussu roknistykkið sær út hjá hesum skipum. Tað, sum eg havi hoyrt um norska línubátin, sum komin er frammanundan, er, at hann hevur havt stórt hall. So, búskaparligta er einki, sum talar fyri hesum - uttan at hjálpa norðmonnum og teirra strámonnum í Føroyum burtur úr teirra trupulleikum. Úrslitið verður bert, at tað verður einki línuskip, sum fær tað at bera til, samstundis sum havgangandi útróðurin verður avtikin við vælsignilsi frá Fiskimálastýrinum.

Tað nyttar so lítið at hava eina lóg um vinnuligan fiskiskap, tá ið hon verður umsitin beinleiðis í stríð við andan í lógini.



## Fyrireikandi fundur til at stovna felag fyri dement (minnisveik) og avvarðandi

Fundurin verður mánakvøldið 25.6 kl. 19 30 í MBF-húsinum. Endamálið við fundinum er at vita, um fakfólk og avvarðandi eru, ið eru sinnað at virka fyri at felag verður stovnað, sum kann arbeiða fyri at bøta um korini hjá teimum dementu og avvarðandi teirra, tí tað er ein tung og svár uppgáva at liva saman við dementum fólki.

Vit hava eingi tøl í Føroyum fyri, hvussu nógv fólk líða av hesi sjúku, men samanbera vit við londini rundan um okkum, er tað óivað stórt og sigast kann, at uml. 60 % av teim dementu líða av alzheimer sjúkuni.

Í londunum rundan um okkum verður nógv kannað og gjørt fyri henda bólkin, og tí halda fyrireikararnir, at løtan er komin at seta hetta á dagsskránna heima hjá okkum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Tað hevur ikki verið lurtað eftir skúlanum

**Pauli Nielsen**
*rektari*

Lat meg siga beinanvegin: Tá ið kreppan kom í hæddina fyrst í 90-árunum, høvdu føroyskir myndugleikar júst yvirtikið umsitingina av Føroya læraraskúla. Hetta hendi við blokkinum í 1988. Seinastu árini undir danskari umsiting var Læraraskúlin skerdur inn at beini, og tí var Føroya Læraraskúli møguliga verri fyr enn aðrir skúlar, tá ið kreppan kom. Men í Danmark var tá ein natúrligur táttur av fíggjarskipanini ella játtanarskipanini, at eitt møguligt undirskot varð játtað á eykafíggjarlóg, og loyvt var í rímiligan mun at flyta útreiðslur og inntøkur millum tvey fíggjarár. Eg skal leggja aftrat, at stórur munur er á tí upphædd, sum kemur inn í landskassan fyri Læraraskúlan sum partur av afturberingini frá danska statinum og tí játtan, sum Læraraskúlin hevur fingið øll hesi árini.

Tað er tí rætt, sum stendur í Dimmalætting leygardagin.

Føroya Læraraskúli hevur strítt eitt vónleyst stríð stóran part av 90-árunum til tess at fáa endarnar at røkka saman. Sama hvat ið skúlin hevur sagt (tá varð ikki altíð alt niðurskrivað), ella skrivað, so hevur ikki borið til at fáa eina játtan,sum gav líkinda vón um at fáa tað at bera til, ið hvussu er ikki í fyrstu syftu.

Av somu grund vildi skúlin til endan ikki einsamallur taka avgerð um upptøku av lesandi, men vildi hava, at Landsskúlafyrisitingin tók endaligu støðuna út frá teimum møguleikum, hon í síðsta enda sá, at bjarga Læraraskúlanum neyðugu játtanina.

Tað er eisini rætt, sum stendur í Dimmalætting leygardaign, at rektarin, vegna vónleysu fíggjarjáttanina, nýtti stóran part av síni tíð á hvørjum ári at leita eftir skerjing oman á skerjing, og tí kom at taka á seg so nógv arbeiði, at tað mátti síggjast aftur í dygdini. Eingin dugir alt líka væl, heldur ikki rektarin á Føroya Læraraskúla.

Dimmalætting nevnir umsitingarleiðaran. Umsitingarleiðari er so nógv sagt, men ein av lærarum skúlans hevði eitt sindur av tíð at taka sær av fíggjarmálum.

Sjálvkravdur vildi hann lata frá sær teir fáu tímar, hann hevði til hetta endamál, tá hann óvæntað aftur hevði fingið fullar hendur í undirvísingini. Kortini lovaði hann fyri onga løn at taka á seg mesta partin av tí arbeið, sum hann áður hevði gjørt, og part av hesum arbeiði ger hann enn, uttan at fáa eitt oyra fyri tað. Alla tíðina hevur hann verið rektaranum góður í ráðum – og eisini í hesum døgum, nú tað leikar so hart á.

Ein sera týðilig niðurstøða frá teirri tíðini er, at myndugleikarnir hava ikki lurtað eftir skúlanum. Tí hevði eg væntað, at tað fór ikki at endurtaka seg. Tað má vera øllum greitt, at tá ið als einki er at geva út av fíggjarliga, og eitthvørt óvæntað smános kroystir ein út um fíggjarkarmin, fær tað óbøtiligar fylgjur ikki at fáa seinastu fáu krónurnar. Tað verður støðugt um reppið, at tað eydnast ella ikki, og so at siga alt valfrælsi verður burtur.

Í ár vildi eg sleppa skúlanum undan pestini og gjørdi vart við, at skúlin mátti hava 500.000,- kr. aftrat játtanini á fíggjarlógini fyri at hava nakran møguleika at taka lesandi upp í summar. Tað eru ráðini og boðskapurin, eg sum rektari havi fingið frá tí partinum av Mentamálastýrinum, sum Læraraskúlin hevur gott dagligt samstarv við, og sum altíð vísir skil fyri teirri serstøku støðu, sum Læraraskúlin er í. Men tað tykist bara, sum gamla mynstrið nú er við at endurtaka seg.

Próvførsla rínur ikki á, tá ið umbønirnar fara vanligu gongdina uppeftir í skipanini, og leiðsla skúlans fær álagt at seta upp eitt roknistykki, sum í seinna enda ikki gongur upp í verki.

Tí var nú ovboðið. Skúlin søkti eykajáttan, sum hann fekk við biti og sliti. Leggjast skal aftrat til kunningar, at Læraraskúlin í dag er dupult so stórur sum í 1991.

Komandi skúlaár vera 201 lesandi á Føroya Læraraskúla, og kortini kostar skúlin nú bert 1 millión meira á fíggjarlógini, enn hann gjørdi tá. Meginparturin av teirri milliónini fer til at gjalda starvsvenjingina hjá teimum trimum flokkunum, sum eru komnir aftrat at hava starvsvenjing, og øll, sum búgva her á landi, og hava dagligar rokningar at gjalda, vita, at nógvar vørur og tænastur eru nógv dýrkaðar hesi somu seinasti 10 árini. Lønirnar standa heldur ikki í stað.

Tíðliga í 90-árunum fann leiðsla Læraraskúlans eina loysn við samlestri millum flokkar í linjugreinunum, sum síðani á hvørjum ári hevur spart landskassanum umleið 2000.000,-, skrivað tvær milliónir krónur um árið. Hetta svarar til ikki minni enn 16.000.000,- kr. tey árini, skipanin hevur virkað, og 10.000,- kr. um dagin, hvønn einasta dag, skúlin hevur verið opin síðani. Tað var rektarin á Føroya Læraraskúla, sum dugdi at síggja ta loysnina og teir pedagogisku møguleikar, sum eisini liggja í henni. Hesin peningur verður av rektarans ávum eisini spardur komandi ár og aftur og aftur komandi árini.

Kortini verður skúlin so niðurpíndur fíggjarliga, at so at siga hvør einasti gerandisdagur hjá leiðsluni á skúlanum er merktur av tí og tekur kreftirnar frá so at siga øllum øðrum arbeiði, sum eigur at verða gjørt.

# Nú fer mær kalt niður eftir bakinum

**Pauli Nielsen**
*rektari*

Í Fregnum fríggjadagin stoyta tveir lesandi í sama pedagogflokki á Læraraskúlanum eina lortabyttu oman yvir skúlan. Tað ger formaðurin í Ráði teirra lesandi eisini.

Hinir báðir eru eisini í nevndini í Ráði teirra lesandi, og samrøðan við formannin saman við samrøðuni við teir, fær í hvussu so er fólk, ið ikki vita betur, at halda, at øll lesandi á Læraraskúlanum standa saman um tað, sum teir siga.

### Tað passar ikki.

M.a. vendi eitt av bløðunum sær ein dagin herfyri til onkran lesandi á skúlanum at fregnast eftir vánaligum tíðindum um skúlan og skúlans leiðslu.

Tá ið blaðið fekk heilt annað at vita, vóru sjálvandi eingi tíðindi at bera.

Heldur enn at svara hvørjari einstakari ákæru frá teimum lesandi í Fregnum, tað ber stutt sagt ikki til, fari eg fyrst ørstutt at greiða frá umstøðunum á Læraraskúlanum og teimum tonkum, sum liggja aftanfyri arbeiðið í gerandisdegnum.

Eins og so at siga allir skúlar, eisini aðrastaðni enn í Føroyum, hevur Føroya Læraraskúli ein rættuliga hopleysa trongan høliskarm at starva í. Stórur partur av hesum høliskarmi er saman við Venjingarskúlanum, so hvørki tey á Venjingarskúlanum, so hvørki tey á Venjingarskúlanum, ella vit á Læraraskúlnum sleppa undan samanrenningum í dagligu undirvísingini. Tað kann við hvørt vera positivt at møtast, men gevur eisini samanstoytir, fæst ikki eyga á møguleikarnar.

Serliga pedagogútbúgvingin starvar nógv í projektum, og tað setur onnur krøv enn undirvísing, har ein lærari situr framman fyri teimum lesandi inni í eini skúlastovu, soleiðis sum tey flestu kenna undirvísing og hugmynda sær undirvísing eisini á einum læraraskúla í 2001.

Fyri at fáa hetta virksemið at bera til, verða vit noydd at nýta hvønn krók á skúlanum, men í ávísan mun kunnu lesandi eisini velja at sita aðrastaðni, t.d. heima, og arbeiða, einsamøll ella saman við øðrum, tá ið tað kann vera ein góð loysn.

Tað, sum tykist vera truplast hjá summum at skilja, er, at undirvísingar- og arbeiðshættirnir á eini læraraútbúgving og eini pedagogútbúgving eru ein líka stórur og umráðandi partur av innihaldinum í undirvísingini, sum fakliga innihaldið annars, sama um tað verður leitað fram úr ymiskum tilfari ella frá ymiskum heimildarfólkum, og frá livandi lærarum og børnum og ungdómum. Tað vita vit, at øll hesi hava royndir, sum lærarar og pedagogar kunnu nýta til tess at gerast klókir upp á, hvussu best er at skipa seg í dagliga pedagogiska arbeiðinum í skúla ella á stovni.

Men at vita um slíkt er ikki nóg mikið, tí eru teir undirvísingar- og arbeiðshættirnir, sum verða nýttir í verki so avgerandi sum innihald í lærara- og pedagogútbúgvingum.

Hetta vita tey eisini á útbúgvingunum í londunum uttan um okkum. Har er júst sama toganin sum her. Men í størri londum enn okkara, við fleiri útbúgvingarstøðum, eru tey, sum royna at draga pedagogisku útbúgvingarnar tann vegin, ið alt vit og skil, ið til er um náttúruna í pedagogiskum útbúgvingum,veit, at tær eiga at fara, har eru hesi nógvu fólk minni útsett enn vit fáu, sum fáast við hetta heima hjá okkum.

Fýlst verður á, at einki mið og mál er fyri undirvísingina á Læraraskúlanum, men til er lóg, sum hevur sítt at siga, til er kunngerð, sum stingur út í kortið fyri virkseminum, og síðani leiðbeinandi lesiætlanir í øllum lærugreinum og evnum.

Eisini tær hava ein endamálspart.

Hetta er grundarlagið undir arbeiðinum á Læraraskúlanum og tað liggur á hvørjum einasta lærara at tulka hesar orðingar, so tær síggjast aftur í dagliga arbeiðinum á útbúgvingini,og at úrslitið av hesum arbeiði sæst aftur í førleikanum hjá tí einstaka at røkja sítt pedagogiska arbeiði, tá ið útbúgvingin er liðug.

Tá ið útbúgvingin er liðug, setur skúlamyndugleikin próvdómarar at meta um førleikan. Teir hava onga grund at fjala yvir ólíkindi á útbúgvingunum á Læraraskúlanum, og øll uttan undatak siga gott fyri tí, sum okkara lesandi hava fingið burturúr, soleiðis sum tey eru før fyri at døma tað. Eg skal eisini nevna, at eitt nú í summar hava vit havt próvdómara av donskum læraraskúla at døma í eini lærugrein, bæði sum linjulærugrein og sum grundlærugrein. Hann var ikki í iva um, at okkara lesandi vóru væl betur fyri fakliga enn teirra lesandi, men helt eisini, at fakliga karakterjagstranin kundi skugga fyri veruliga endamálinum við undirvísingini, sum er hegni at arbeiða við lærugreinini í verki saman við børnum og ungum, so tað stingur djúpari enn bara vitan.

Aftaná var lærari okkara í somu lærugrein próvdómari niðri í Danmark, og heimafturkomin var hon heldur ikki í iva um fyrimunin, sum okkara lesandi høvdu. Leiðslan á Læraraskúlanum hevur fult álit á, at próvdómararnir gera sítt arbeiði til lítar.

Fara vit til møtiskylduna, so er hon eitt mál, sum av og á kemur til umrøðu. Í lógini, § 11, stk. 6 stendur: Øll, ið hava nomið ta undirvísing, sum miðar ímóti læraraprótøku, hava atgongd at fara upp til hesa próvtøku. Henda orðing hevur altíð verið tulkað sum møtiskylda.

Men sum útbúgvingin er skipað við nógvum einstaklingsarbeiði og við arbeiði longri tíð í bólkum, ber ikki til at skriva protokol, sum tá ið talan er um síðbundna undirvísing. Tí er mannagongdin á Læraraskúlanum tann, at fyrst gera tann einstaki lærarin vart við seg hjá teimum, sum hann heldur, røkja skúlan illa. Hjálpir tað ikki, kemur flokslærarin uppí, og til síðst – eftir áheitan frá lærararáðnum – rektarin. Tað er á ongan hátt óvanligt, at leiðsla skúlans hevur samrøðu við lesandi um, hvussu tey røkja skúlan, at tey fáa ávarðing, mugu ganga umaftur ella kanska fara.

Tað, sum kann undra, er, at vaksin fólk siga seg ikki fáa gingið í skúla, tí onnur í sama flokki røkja skúlan illa. Tey, ið soleiðis hugsa, hava ein trupulleika, sum er ringur at loysa.

Eftir mínum tykki ber væl til at vera ósamdur við leiðslu Læraraskúlans. Hurðin inn á skrivstovu rektarans stendur so at siga altíð víðopin. Tað, sum ikki ber til, er at halda, at ein og hvør lesandi altíð hevur rætt, tá ið hann ikki skilur, og tí ger natúrliga mótstøðu ímóti teimum stóru avbjóðingum, sum hann fær á skúlanum.

Tað nógva av tí, sum ført verður fram í greinunum í Fregnum, er tílikt, sum hevur við grundleggjandi hugburð at gera og fatan av, hvat ið er týdningarmikið í útbúgving av lærarum og pedagogum.

*framhald á næstu síðu*